NEMA casa SENTA SENDISTOVAN ATLANTSTØKNI city kvasir




# Vit Nema breitt – alt árið

Nýggi álmanakkin hjá Nema er komin og gevur tær 365 spildurnýggjar dagar til at fremja tínar ætlanir.

## Álmanakkin er ókeypis og fæst á hesum støðum:

Senta, Brekkutún 4, 188 Hoyvík
Sendistovan, J. Paturssonar gøta 34, 100 Tórshavn
Atlantstøkni, Grønlandsvegur 38, 100 Tórshavn
City, Smyrilsvegur 7, 100 Tórshavn
City/Senta, Stangavegur 53, 700 Klaksvík
City, Heiðavegur 3, 620 Runavík
Casa, Smyrilsvegur 5, 100 Tórshavn
Føroya Bjór, Akranesgøta 10, 100 Tórshavn
Føroya Bjór, á Drelnesi, 826 Trongisvágur
Føroya Bjór, á Mølini, 220 Skálavík
Kunningarstovan, Tvørávegur 37, 800 Tvøroyri
Kunningarstovan, Vágsvegur 22, 900 Vágur
Kunningarstovan, 210 Sandur
Vága Kunningarstova, Leitisvegur 58, 370 Miðvágur
Kommunuskrivstovan, Bakkavegur 16, 350 Vestmanna

SENDISTOVAN

STARVSLÝSING

# Sølu- og marknaðarleiðari

**Til sølu- og marknaðardeild okkara søkja vit eftir nýggjum leiðara, sum kann virka fyri framhaldandi menning av inntøkugrundarlag okkara**

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku fjølmiðlunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Fremsta uppgávan hjá marknaðarleiðaranum er at hava ábyrgdina av allari vanligari lýsingaavgreiðslu og -samskipan. Í hesum er roknað dagliga samskipan av lýsingum, sum skulu í Sosialin og strategi fyri innheintan av nýggjum lýsingum, eins og tilrættisleggjan av arbeiðs- og mannagongdum á lýsingadeildini.

Eisini er tað uppgávan hjá leiðaranum at vera partur av arbeiðnum at menna fyritøkuna. Herundir at seta saman nýggj produkt á lýsingarøkinum. Greinan av marknaðarkanningum og nýtslu av hesum. Profilering av fyritøkuni mótvegis umheiminum og sum heild at styrkja fyritøkuna, soleiðis at marknaðarstøðan hjá fyritøkuni kann varðveitast og styrkjast.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller á tel. 341831. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jan@sosialurin.fo.

Umsóknarfreistin er 15. desember, og miða vit eftir at seta starvið tann 1. februar í 2010.

**Sosialurin**
Att.: Jan Müller
Postsmoga 76
FO – 110 Tórshavn

Sosialurin hevur seinnu árini vaksið um virksemið frá at vera eitt tíðindablað, til at verða størsta fjølmiðla-fyritøka í landinum. Konsernin umfatar Sosialin, Rás2 og tíðindaflutningin á heimasíðunum á portal.fo, sum er fremsta heimasíðan í Føroyum. Í dag starvast tilsamans umleið 42 starvsfólk í konsernini.

Tórsgøta 1
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Sosialurin

Sosialurin 341800